GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/F
Tlf.: +298 591616 - Fax.: +298 591617

# Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi
176 Velbastaður

Grannskoðanarprotokoll fyri 2017

Heiðavegur 31 - FO-600 Saltangará
post@gs.fo - www.gs.fo
Sp/f skrá nr. 3868

1 **Eyðmerking av grannskoðaða ársroknskapinum fyri 2017** ..... 1
2 **Niðurstøða av grannskoðanini av ársfrásøgnini fyri 2017** ..... 1
3 **Umstøður av týdningi fyri roknskaparuppgerðina** ..... 1
3.1 Viðmerkingar til roknskaparuppgerðina ..... 1
3.2 Vantandi starvsbýti ..... 2
3.3 Orðaskifti við leiðsluna um svik ..... 2
3.4 Bókhald/Fyrisiting ..... 2
3.5 Lønarútreiðslur ..... 2
3.6 Varveitsla av roknskapartilfari ..... 2
3.7 Annað ..... 2
4 **Viðmerkingar/frágreiðingar til ársroknskapin** ..... 3
4.1 Játtan ..... 3
4.2 Rakstrarlýsing ..... 3
4.3 Matur og drykkjuvørur kr. 314.739,31: ..... 4
4.4 Orkukeyp - el kr. 38.726,46: ..... 4
4.5 Orkukeyp til hiting kr. 25.372,19: ..... 4
4.6 Keyp av vørum annars kr. 109.178,97: ..... 4
4.7 Keyp av tænastuveitingum annars kr. 502.633,44: ..... 5
4.8 Lán og avdráttir ..... 5
4.9 Gjaldførisstøða ..... 5
5 **Aðrar upplýsingar** ..... 5
5.1 Roknskaparváttan frá leiðsluni og skeivleikar, ið ikki eru rættaðir, í ársfrásøgnini ..... 5
5.2 Aðrar fráboðanir frá leiðsluni ..... 5
6 **Lógarkravdar upplýsingar v.m.** ..... 5
7 **Grannskoðarans váttan í sambandi við ársroknskapin fyri 2017** ..... 6

## 1 Eyðmerking av grannskoðaða ársroknskapinum fyri 2017

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi fyri 2017, ið leiðsla felagsins hevur greitt úr hondum.

Ársroknskapurin vísir hesi úrslit, ognir og eginpening:

| | | |
|---|---|---|
| Úrslit (Viðgerðarstovnurin) | kr. | 238.555,23 |
| Úrslit (Sjálvsognarstovnurin) | kr. | 0,00 |
| Ogn (Sjálvsognarstovnurin) | kr. | 3.033.184,66 |
| Eginpeningur (Sjálvsognarstovnurin) | kr. | 2.006.332,22 |

## 2 Niðurstøða av grannskoðanini av ársfrásøgnini fyri 2017

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, ið leiðsla felagsins hevur greitt úr hondum, og út frá hesum tikið støðu til, um tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu, umframt úrslitinum av felagsins virksemi í samsvari við galdandi roknskaparkunngerð. Ársroknskapurin fevnir um rakstrarroknskap og fíggjarstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til at tillaga okkara niðurstøðu ella at geva ískoytisupplýsingar í grannskoðanarátekningini. Viðmerkingar okkara til grannskoðanina av ársroknskapinum standa í stykki 3.

Endamálið og vavið av grannskoðanini er óbroytt í mun til fyrr. Annars vísa vit til avtalu um grannskoðan, sí byrjanarprotokoll frá 11.03.2011.

Um leiðslan góðkennir ársfrásøgnina, sum hon er, og ikki aðrar upplýsingar koma fram, meðan ársfrásøgnin verður viðgjørd, vátta vit ársroknskapin uttan fyrivarni og uttan ískoytisupplýsningar.

## 3 Umstøður av týdningi fyri roknskaparuppgerðina

Í sambandi við grannskoðan okkara av ársroknskapinum, skulu vit vísa á hesar umstøður:

### 3.1 Viðmerkingar til roknskaparuppgerðina

Heilbrigdi var í 2011 lagt inn í Fíggjarskipan Landsins (FSL). Tá var avgjørt at skilja stovnin í tvey, eitt viðgerðarheim, ið er ein reinur rakstrarstovnur og sjálvsognarstovn, sum í verandi løtu ikki hevur annað virksemi enn eina húsaogn. Viðtøkurnar §7 áseta at:

> *Stk. 1: Fyri hvørt fíggjarár verða gjørdir roknskapir fyri ávikavist viðgerðarheimið Heilbrigdi og ognina hjá sjálvsognarstovninum Heilbrigdi. Roknskapirnir skulu setast upp samsvarandi kontoskipan landsins.*
>
> *Stk. 2: Roknskapurin fyri viðgerðarheimið Heilbrigdi fevnir um allar vanligar rakstrarútreiðslur. Roknskapurin fyri ognina hjá felagnum Heilbrigdi fevnir um størri viðlíkahald, lánsafturgjalding og leiguinntøkur v.m. frá viðgerðarheiminum Heilbrigdi.*

Gjørdur verður tí ein reinur rakstrarroknskapur fyri "Viðgerðarheimið Heilbrigdi". Roknskapurin hjá "viðgerðarheiminum Heilbrigdi" hevur onga fíggjarstøðu, hetta tí at Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur ongar ognir, sum skulu skrásetast, sí viðmerkingar til STRKT 3291, har viðmerkt er at útvegan skal verða "*minst 75 túsund kr. uttan MVG*"

Uppá fyrispurning til Heilsumálaráðið 16. apríl 2012, um ognarar hjá Heilbrigdi í FSL skipanini, fingu vit at vita at:

*Heilbrigdi hevur ikki sína figgjarstøðu í FSL – eins og aðrir sjálvsognarstovnar. Fíggjarstøðan á st.nr. 143625 bestendur vanliga bara av kontu 0510 (akkumulerað "undirskot") og kontu 0360 (ójavnvág á skjalaniveau). Serliga tí, at útreiðslan verður bókað á st.nr. 143625, meðan gjaldføri verður lagt út av landskassanum. Uppgávan hjá kontu 0360 er at tryggja, at hvørt einasta skjal á stovnsnr 143625 verður "debet=kredit", hóast landskassin vanliga er krediteringin á skjalaniveau.*

Viðvíkjandi sjálvsognarstovninum Heilbrigdi er tað so at allur rakstur er fluttur til viðgerðarheimið Heilbrigdi. Tað einasta, sum er eftir í sjálvsognarstovninum er bygningurin á Velbastað og skuldin sum er í honum.

Av tí at talan sum so er um eitt og sama felag verða báðir roknskapirnir gjørdir í sama skjali. Við frámerki um hvat er viðgerðarheim og hvat er sjálvsognarstovnur.

### 3.2 Vantandi starvsbýti

Orsakað av støddini á virkinum og talinum av starvsfólkum, sum taka sær av fyrisitingini, er einki veruligt innanhýsis eftirlit, sum er grundað á arbeiðsbýtið ímillum starvsfólkini, sett í verk. Grannskoðan okkara er tí í minni mun grundað á arbeiðsgongdir og innanhýsis eftirlit á virkinum. Vit mugu tí gera vart við, at av tí, at starvsfólk hava eftirlit við egnum arbeiði, eru eingi, ella sera avmarkað líkindi til, at eftirlitið varnast skeivleikar.

### 3.3 Orðaskifti við leiðsluna um svik

Meðan vit hava grannskoðað, hava vit spurt leiðsluna um vandan fyri sviki, og leiðslan hevur boðað frá, at eftir hennara tykki er ikki serligur vandi fyri, at ársroknskapurin kann hava týðandi skeivleikar, orsakað av sviki.

Leiðslan hevur eisini boðað frá, at hon hevur ongan kunnleika til svik ella kanningar av møguligum sviki.

Vit eru, meðan vit hava grannskoðað, ikki komin fram á viðurskifti, sum benda á ella vekja illgruna um svik av týdningi fyri upplýsingarnar í ársroknskapinum.

### 3.4 Bókhald/Fyrisiting

Eftir okkara tykki verða bókhald og fyrisiting umsitin á fullgóðan og tryggan hátt, sí tó punkt 3.2.

### 3.5 Lønarútreiðslur

Eftir at Heilbrigdi er lagt inn í Fíggjarskipan Landsins (FSL), hevur ikki verið møguligt at avstemma lønarútreiðsluna hjá Heilbrigdi mótvegis skrásetingunum hjá TAKS.

### 3.6 Varveitsla av roknskapartilfari

Tað áliggur aðalráðunum og teimum stovnum, sum eru undir teimum, at goyma roknskapartilfar í 5 ár frá tí, at roknskaparárið er endað. Skjalagoymslan skal verða skipað á ein slíkan hátt, at hon er trygg, og at tað ber til sjálvstøðugt og eintýtt at finna fram aftur roknskapartilfarið í goymslutíðarskeiðnum.

Allar skrásetingar viðvíkjandi viðgerðarstovninum Heilbrigdi eru seinastu 5 árini gjørdar í FSL eins og alt skjalatilfar verður varveitt í Fíggjarskipan Landsins.

### 3.7 Annað

Grannskoðanin hevur ikki fevnt um tryggingarviðurskifti stovnsins, men heita vit á leiðslu stovnsins um at ansa eftir, at ognirnar eru virðiliga tryggjaðar.

Undantikið omanfyristandandi viðmerkingar og tær viðmerkingar, sum møguliga framganga av átekningini á roknskapin, hevur grannskoðanin ikki givið orsøk til viðmerkingar.

# 4 Viðmerkingar/frágreiðingar til ársroknskapin

Ársroknskapurin er gjørdur eftir galdandi roknskaparkrøvum, sum lógir og viðtøkur áseta, og gevur, eftir okkara tykki, eina rættvísandi mynd av stovnana ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2017 og av úrslitinum av virksemi stovnana í roknskaparárinum 1. januar — 31. desember 2017.

## 4.1 Játtan

Játtanin fyri 2017 var uppá kr. 5.960.000, sum stovnurin hevur fingið goldið í árinum.

| | Fíggjarætlan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 11 Lønir v.m. | 4.488 | 4.257 | 231 |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 1.220 | 1.171 | 49 |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 60 | 44 | 16 |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 30 | 87 | -57 |
| 55 Íløgustuðul | 162 | 162 | 0 |
| Nettoútreiðsla | 5.960 | 5.721 | 239 |

Meirnýtsla er á eini kontu, samanlagt er ein minninýtsla uppá 239 tkr.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar, uttan mvg, vóru kr. 5.721.445, sostatt var nýtslan kr. 238.555 minni enn játtanin. Býtt sundur millum lønir og annan rakstur eru nýttar kr. 231.166 minni til lønir, meðan tað eru nýttar kr. 7.390 minni til annan rakstur.

## 4.2 Rakstrarlýsing

Sambært ársfrágreiðing fyristøðumannsins fyri 2017 vóru 85 persónar til viðgerðar á Heilbrigdi á Velbastað í 2.118 dagar, meðan tað í 2016 vóru 84 persónar til viðgerðar í 2.271 dagar.

Heilbrigdi hevur í 2017 eisini haft eftirviðgerðarskeið, svarandi til 423 viðgerðardagar Samlaðu viðgerðardagarnir í 2016 eru sostatt 2.802.

Út frá hesum hava vit sett upp niðanfyri standandi yvirlit yvir 3 tey seinastu árini.

| År | 2015 | | | 2016 | | | 2017 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 88 | | | 84 | | | 85 | | |
| S.dagar | 2.388 | | | 2.271 | | | 2.118 | | |
| Aðrir dagar | 502 | | | 531 | | | 423 | | |
| S.dagar pr. innl. | 27,1 | | | 27,0 | | | 24,9 | | |
| | Útreiðsl. íalt | Útr. pr. innl. | Útr. pr. dag | Útreiðsl. íalt | Útr. pr. innl. | Útr. pr. dag | | Útr. pr. innl. | Útr. pr. dag |
| Rakstrarútreiðslur | 1.607.938 | 18.272 | 556 | 1.530.637 | 18.222 | 546 | 1.302.736 | 15.326 | 513 |
| Lønir incl gjøld | 4.102.241 | 46.616 | 1.419 | 4.171.707 | 49.663 | 1.489 | 4.256.834 | 50.080 | 1.675 |
| Íalt | 5.710.179 | 64.888 | 1.976 | 5.702.344 | 67.885 | 2.035 | 5.559.571 | 65.407 | 2.188 |
| Rentur | 77.517 | 881 | 27 | 72.281 | 860 | 26 | 65.956 | 776 | 26 |
| Íalt | 5.787.696 | 65.769 | 2.003 | 5.774.625 | 68.746 | 2.061 | 5.625.527 | 66.183 | 2.214 |
| Avdráttir | 84.483 | 960 | 29 | 89.719 | 1.068 | 32 | 95.918 | 1.128 | 38 |
| Íalt | 5.872.179 | 66.729 | 2.032 | 5.864.344 | 69.814 | 2.093 | 5.721.445 | 67.311 | 2.252 |

### 4.3 Matur og drykkjuvørur kr. 314.739,31:

Hetta er innkeyp av allari vanligari matvøru og drykkjuvøru til køkin. Við 2.541 innleggingar/mat døgum svarar hetta til kr. 123,86 pr. fólk pr. dag. Árið fyri vóru útreiðslurnar kr. 327.334,50 í 2.802 dagar ella kr. 116,82 pr. fólk pr. dag.

### 4.4 Orkukeyp - el kr. 38.726,46:

Hetta er orkunýtsla á Velbastað.

### 4.5 Orkukeyp til hiting kr. 25.372,19:

Keyp av olju og gassi. Oljan er til upphiting av ognini á Velbastað.

### 4.6 Keyp av vørum annars kr. 109.178,97:

| | | 2017 | | 2016 | | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skrivstovulutir | kr. | 7.658,28 | kr. | 3.054,00 | kr. | -4.604,28 |
| Smærri lutir til teldu o.tíl. | kr. | 1.951,20 | kr. | 0,00 | kr. | -1.951,20 |
| Dagbløð | kr. | 1.548,00 | kr. | 1.548,00 | kr. | 0,00 |
| Frálærutilfar | kr. | 0,00 | kr. | 1.786,00 | kr. | 1.786,00 |
| Búnýtur | kr. | 837,84 | kr. | 0,00 | kr. | -837,84 |
| Smáhvítvørður | kr. | 5.962,25 | kr. | 0,00 | kr. | -5.962,25 |
| Smáinnbúgv | kr. | 15.753,05 | kr. | 0,00 | kr. | -15.753,05 |
| Reinførisvøra | kr. | 10.463,54 | kr. | 10.100,00 | kr. | -363,54 |
| WC-pappír, køkspappír o. a. | kr. | 10.673,45 | kr. | 0,00 | kr. | -10.673,45 |
| Plastvørur, eingangsservisa | kr. | 514,28 | kr. | 0,00 | kr. | -514,28 |
| Heilivágur | kr. | 18.294,80 | kr. | 13.098,00 | kr. | -5.196,80 |
| Apoteksvøra, sum ikki er heilivágur | kr. | 1.701,59 | kr. | 488,00 | kr. | -1.213,59 |
| Blæur | kr. | 0,00 | kr. | 198,00 | kr. | 198,00 |
| Máling o.t. | kr. | 139,12 | kr. | 322,00 | kr. | 182,88 |
| Smærri handamboð | kr. | 4.197,56 | kr. | 262,00 | kr. | -3.935,56 |
| Tilfar og lutir til røkt av bygningum | kr. | 16.530,66 | kr. | 14.632,00 | kr. | -1.898,66 |
| Ljósperður, ljósrør | kr. | 1.271,23 | kr. | 0,00 | kr. | -1.271,23 |
| Tilfar og lutir til røkt av uttanduraøki | kr. | 2.300,00 | kr. | 0,00 | kr. | -2.300,00 |
| Annað keyp | kr. | 0,00 | kr. | 6.860,00 | kr. | 6.860,00 |
| Skrivstovulutir | kr. | 0,00 | kr. | 3.246,00 | kr. | 3.246,00 |
| Smá amboð | kr. | 789,60 | kr. | 9.273,00 | kr. | 8.483,40 |
| Máling, ilt og gass | kr. | 8.592,52 | kr. | 5.258,00 | kr. | -3.334,52 |
| Húsaútreiðslur | kr. | 0,00 | kr. | 113,00 | kr. | 113,00 |
| Íalt | kr. | 109.178,97 | kr. | 70.238,00 | kr. | -38.940,97 |

### 4.7 Keyp av tænastuveitingum annars kr. 502.633,44:

| | | 2017 | | 2016 | | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilútreiðslur | kr. | 0,00 | kr. | 4.015,00 | kr. | 4.015,00 |
| Lækna- og tannlæknasamsýning o.l. | kr. | 390.808,00 | kr. | 539.628,00 | kr. | 148.820,00 |
| Skeiðsútreiðslur | kr. | 0,00 | kr. | 23.704,00 | kr. | 23.704,00 |
| Reingerð og ruskkoyring | kr. | 81.632,57 | kr. | 88.009,00 | kr. | 6.376,43 |
| Uttandurða viðlíkahald | kr. | 10.860,00 | kr. | 0,00 | kr. | -10.860,00 |
| Lýsingar og lýsingartiltøk | kr. | 14.200,00 | kr. | 2.140,00 | kr. | -12.060,00 |
| Elektronisk hald | kr. | 5.132,87 | kr. | 0,00 | kr. | -5.132,87 |
| Gjald fyri undirsjóvartunnil | kr. | 0,00 | kr. | 1.200,00 | kr. | 1.200,00 |
| Farma/flutningsgjøld | kr. | 0,00 | kr. | 396,00 | kr. | 396,00 |
| Íalt | kr. | 502.633,44 | kr. | 659.092,00 | kr. | 156.458,56 |

### 4.8 Lán og avdráttir

Í sambandi við at Heilbrigdi í 2011 varð lagt inn í Fíggjarskipan Landsins (FSL), er gjørt eitt sundurbýti í viðgerðarstovn og sjálvsognarstovn. Viðgerðarstovnurin er tann stovnurin, sum hevur fingið játtan á fíggjarlógini í 2017, meðan sjálvsognarstovnurin ikki fær nakra játtan. Einasta inntøka hjá sjálvsognarstovninum er ein leiguinntøka, ið neyvt samsvarar við rentur og avdráttir av láni í bygninginum. Renturnar vóru kr. 66.082,37, meðan avdráttirnir vóru kr. 95.917,63.

### 4.9 Gjaldførisstøða

Við umleggingini til viðgerðarstovn og sjálvsognarstovn er eingin skuld í stovninum, sum verður rikin av játtan á fíggjarlógini. Skuldin í sjálvsognarstovninum er kr. 1.0296.852,44.

## 5 Aðrar upplýsingar

### 5.1 Roknskaparváttan frá leiðsluni og skeivleikar, ið ikki eru rættaðir, í ársfrásøgnini

Sum liður í grannskoðanini av truplum økjum, hevur leiðslan givið okkum eina roknskaparváttan viðvíkjandi ársroknskapinum fyri 2017.

Allir staðfestir skeivleikar eru rættaðir í ársroknskapinum.

### 5.2 Aðrar fráboðanir frá leiðsluni

Leiðslan skal, í sambandi við at protokollin verður undirskrivað, boða frá:

- At hon ger sínar skyldur, sum tilskilað í byrjanarprotokollini frá 11.03.2011, fyri at kunna gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við galdandi roknskaparkunngerð.
- At hon ger sínar skyldur við tillaging av innanhýsis eftirliti soleiðis, at tað er møguligt at gera ein ársroknskap uttan týðandi skeivleikar, sama um hesir komast av sviki ella mistøkum.
- At hon hevur givið atgongd til allar viðkomandi upplýsingar v.m. og atgongd til starvsfólk á virkinum, sum eru viðkomandi fyri at fáa grannskoðanarprógv og fyri at gera ársroknskapin.

## 6 Lógarkravdar upplýsingar v.m.

Vit hava kannað, at leiðslan heldur sínar skyldur, sambært viðtøkum stovnana, at føra bøkur, yvirlit og protokollir, eins og undirskrivar grannskoðanarprotokollir. Harafturat hava vit ansað eftir, at felagið yvirheldur lógina um bókhaldsskyldu á øllum týðandi økjum.

## 7 Grannskoðarans váttan í sambandi við ársroknskapin fyri 2017

Sambært grannskoðanarlógini skulu vit vátta:

at vit lúka lógarinnar krøv um gegni, og

at vit, meðan vit hava grannskoðað, hava fingið allar upplýsingar, sum vit hava biðið um.

Saltangará, hin 20. juli 2018

**GrannskoðaraStovan í Runavík Sp/f,**
góðkent grannskoðanarvirki

**Mark T. Højgaard**
Skrás. grannskoðari

Undirritaða leiðsla stovnana váttar hervið at hava lisið frammanfyristandandi grannskoðanarprotokoll, síða 1 – 6.

Velbastaður, hin 20. juli 2018

**Fyristøðumaður:**

Sjúrður Knudsen

**Nevnd:**

Rasmus Patursson, fm.

Kári Thorsteinsson

Jákup Lindenskov

Michael Olsen

Jens Andreassen